# Vanta venjarar

Havnar Fimleikarafelag vantar venjarar til dreingjaliðini hjá felagnum. Uml. 50 dreingir í aldrunum frá fimm til sjey ár og í aldrunum frá 5. flokki og uppeftir standa uttan venjara.

– Ofta hevur tað verið trupult at fáa venjarar til dreingjaliðini, men hesuferð bar av. Eingin venjari varð funnin, tá fimleikaárið byrjaði. Og um eingin venjari verður funnin rættiliga skjótt, so sleppa hesir dreingir tíverri ikki at gera fimleik í ár, sigur Anny Kyster Durhuus frá Havnar Fimleikarafelag.

Áhugað verða biðin um at venda sær til Anny Kyster Durhuus á telefon 228892. Fimleikaárið byrjaði tann 30. august.

**-hkm**

# Lindin víðkar virksemið

Í kvøld, leygarkvøld, verður temakvøld í Lindini. Kl. 20 byrjar andaliga útvarpsrásin at senda, og evnið verður Lindin sjálv. Lurtarin kemur at frætta um fortíð, nútíð og framtíð hjá Lindini. Slørið verður eisini lyft fyri nýggju vetrarskránni.

– Fyri framman liggur víðkanin til m.a. Vágoynna, nýggjar og broyttar sendingar verða á vetrarskránni, og greitt verður frá dreymunum um skjótt at kunna senda allan sólarringin, til allar bygdir, og út um landoddanar, sigur Lindin.

**-hkm**

# Guðfrøðingur og marxistur

Tórður Jóansson, málfrøðingur, bókmentafrøðingur og fyrrverandi handilsskúlalærari, hevur ein tíð lisið guðfrøði í Glasgow. Tórður er framvegis politiskt virkin ytst á vinstravonginum, men tað er ikki í andsøgn við guðfrøðina, heldur tvørturímóti, sigur Tórður.

**Í ÚF hósdagin kl. 16.03.**

## VIÐMERKINGAR

# Lad dog stenen ligge, hvor den ligger

**Mogens Tilsted Christensen**
*Sognepræst*

Hvis en sten er så stor, at den ikke kan flyttes, så kunne det være en god ting, at man lod den ligge, hvor den ligger!

Fra Kristelig Dagblad fredag den 3. september 2004:

Georg Hinge, der lever i homoseksuelt parforhold siger bl.a. om modstanden imod at foretage vielser af homoseksuelle i den kristne kirke:

»Det er et problem, fordi kirken derved skyder nogle mennnesker fra sig, som burde være fuldgyldigt medlem af menigheden. Efter min mening må der være lighed: Kan kirken vie heteroseksuelle par, bør den også kunne vie to mennesker af samme køn, men jeg tror ikke på ligestilling, før stat og kirke bliver skilt ad, medmindre, selvfølgelig, at de politikere, der nu taler om ændringer, får magt og står ved deres standpunkter«

og andet sted i bladet hedder det:

»… – Det er ligeså vigtigt for os som for heteroseksuelle at blive viet i kirken, siger Bent Hansen, der er formand for landsforeningens kirkeudvalg. Han ved ikke, hvor mange medlemmer, der vil benytte muligheden for en kirkelig vielse, og han kan godt forstå, at nogle præster er imod…"«

Det, som foregår, kan bedst sammenlignes med, som sker, når et lille enebarn vil have sin vilje. Hvis ikke det får sin vilje, så råber det op og gør sig umulig, indtil forældrene giver efter.

**Men angående emnet vielse af homofile – er det i grunden ikke dumt, selvmodsigende og en uskik at ville tvinge Gud med i noget i den evangelisk lutherske kirke, hvis det, som ønskes indført, strider imod Guds ord?**

Dr. Martin Luther, hvis navn den evangelisk-lutherske kirke er opkaldt efter, stod fast på, at enhver tolkning skulle være baseret på skrifterne alene også kaldet »sola scriptura«.

De, som vil tage ansvaret herfor, må lige tænke sig om, tak.

Det er vel ikke for meget at forlange!

Med venlig hilsen
Mogens Tilsted
Christensen


# Verkfrøðingur ella teldufrøðingur



KT-fyritøkan Atlants Tøkni sóknast eftir fólki, ið helst av øllum hevur hægri verkfrøðiliga ella teldufrøðiliga útbúgving. Hevur tú hollar royndir í at menna forrit, eru vit áhugað í tær. Nom og nærløgd nýútbúgvin og onnur dugnalig fólk, ið eru tøkniliga væl fyri eftir drúgvar og ymiskar royndir á KT-økinum, eru sjálvandi eisini áhugaverd. Starvsfólkið á Atlants Tøkni er vælútbúgvið og hevur nógvar royndir. Vit kunnu bjóða tær eitt gott og mennandi fakligt umhvørvi.

Starvið er fjøltáttað. Undir øllum umstøðum sleppur tú at dusa tær í nýggjastu tøknini. Tú fert kanska at arbeiða á øllum økjum okkara og sostatt fremja einstakar ætlanir úr enda í annan. Men ert tú sjáldsama serkønur, kanst tú eisini leggja teg eftir at røkja serstakar partar av heildarætlanum.

Tú fært góða løn sambært avtalu.

Send okkum umsókn, prógv og annað áhugavert. Ella støkk inn á gólvið hjá okkum á Bryggjubakka í Havn.

*Atlants Tøkni varð stovnað á vári 2001 og er ein føroysk fyritøka, ið veitir skikkaða KT-tænastu. Í fyritøkuni starvast seks fólk. Vit hava serkunnleika í at menna og laga skipanir til í Microsoft og Oracle umhvørvi, hava dátuumsiting (DBA), arbeiða við Client/ Server-loysnum, gera góðar web- og innanhýsis netgreiðslur og veita ráðgeving í hesum og øðrum sambandi. Vit hava viðskiftafólk bæði í Føroyum og uttanlands.*

***Atlants Tøkni*** *· Bryggjubakka 4*
*Postsmogu 277 · FO-110 Tórshavn*
*Tel 32 20 90 · Faks 32 20 92*
*Teldupostur: att@att.fo*
*www.att.fo*

**Atlants Tøkni**

REPROZ




**FØROYA LANDFÚTI**
**POLITIMEISTARIN**

## KUNNING FRÁ FÚTASKRIVSTOVUNI UM PASS

Tann 1. oktober 2004 verður nýggja útgávan av føroyska/danska passinum tikin í nýtslu.

Nýggja passið er eitt hátøkniligt trygdarpass.

**Onki krav verður sett um umbýtan av galdandi passi!**

Av tí at nýggja passframleiðsluútgerðin er so kostnaðarmikil, er avgerð tikin um at gevast við passframleiðsluni í Føroyum, soleiðis at øll passframleiðsla verður miðsavnað í Danmark.

**Hetta ger, at møguleikin hjá fútaskrivstovuni í skundi at útskriva nýtt pass eftir 1. oktober 2004 dettur burtur.** Í staðin ber til í summum førum at framleingja verandi pass ella at fáa útflýggja "provisorisk" (fyribils) pass.

**Hetta førir eisini við sær, at passavgreiðslutíðin tá verður umleið 2 - 3 vikur.** Tí er alneyðugt, at fólk, ið hava tørv á nýggjum passi eftir 1. oktober 2004, umbiðja passið í góðari tíð.

Frá 1. oktober 2004 kunnu børn undir 15 ár ikki verða skrivað í pass hjá foreldrum ella øðrum og skulu tá hava egið pass.

Mannagongdin at umbiðja pass verður hin sama sum nú. Passavgreiðslur eru á fútaskrivstovuni í Havn og á politistøðunum uttanfyri Havnina.

Upplýsingar um pass annars eru tøkar á heimasíðuni hjá politinum: www.politi.fo

M. Nepper-Christensen

Smyrilsvegur 20 Postboks 3018 FO-110 Tórshavn Tel (+298)351448 Telefax (+298) 351452






TOYOTA

# Ups...

**Hann snurraði so fínt í áðni, men nú letur ikki í honum. Tað einasta, ið hoyrist, er afturvendandi klikkið av hazardljósinum. Hvat nú?**

**6 mánaða garanti** Reyni Service bjóðar nú eina spildurnýggja tænastu og eina eyka trygd til tey, ið ynskja ein brúktan bil, við nærum eins góðari trygd, sum var hann nýggjur.

Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn kr. 85.000,-

Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eyðsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella vantandi tænastueftirlit. Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.

Kom og vitja okkum á landsins fremstu bilasølu.

TEAM85

Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040 · Fax 353041
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

**REYNI SERVICE P/F**



WWW.SMYRIL-LINE.COM



# Skrivari til farmadeildina

**Søkt verður eftir skrivara til farmadeildina.**

Starvið umfatar millum annað vanligt skrivstovuarbeiði og samskifti av ymiskum slag.

**Arbeiðsuppgávur**
Tú kemur at taka tær av ymiskum skrivaraarbeiði, sum at samskifta við viðskiftafólk, samskipa fundir, arkivera og gera sjálvstøðugar skrivligar uppgávur, sum brævasamskifti, fundarfrásagnir, samandráttir o.a.

**Førleikakrøv:**
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- Skal duga føroyskt og enskt í skrift og talu
- Góðan teldukunnleika
- Tænastuhugað/ur og góð samstarvsevni

Løn sambært avtalu.

Umsókn við møguligum prógvum og CV skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 20. september og skulu stílast til:

*Smyril Line*
*Postsmoga 370*
*FO-110 Tórshavn*
*Att.: Heðin Joensen*
*ella við telduposti til: hedinj@smyril-line.fo*

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Heðin Joensen, leiðara á farmadeildini, á tlf. 34 59 62.

**Eystara Bryggja · Postsboks 370**
**FO-110 Tórshavn · Tlf: 34 59 60**
**Fax: 34 59 52 · cargo@smyril-line.fo**



www.sosialurin.fo


www.sosialurin.fo



# Stovnið breiðband fyri

0,- kr.*)

Prísir úr 280,- kr./mðr.

Stovnar tú I-net Breiðband frá Føroya Tele, geva vit tær stovningina púra ókeypis - tú sparir 750,- kr.

Ring 808080, vitja www.tele.fo ella eina telebúð og fá I·net Breiðband til júst tín tørv...

I·net BREIÐBAND

**) Treytað av at tú teknar I·net breiðbandhald privat frá Føroya Tele í 6 mðr. Tilboðið er galdandi til og við 1. oktobur 2004. Vanligur prísur fyri stovning er kr. 750,-. Montørgjald og mótald, ið kann keypast frá Føroya Tele, er ikki íroknað. Sí meira á www.tele.fo.*

FØROYATELE

petur & petur • 320870